# Jól í Avstralia 2

Siðvenja er í Avstralia, at børnini fáa at vita, at Father Christmas – Jólamaðurin – vitjar tey ymisku heimini Jólaaftan, og leggur gávur undir jólatrøini, í hosur, ella í ein sekk, sum er beint við eldstaðin. Men seinnu árini er alsamt fleiri hús bygd í Avstralia, sum ikki hava ein eldstað, men roynt verður eftir førimuni at halda hendan jólasiðin. Í nógvum býum, og býarpørtum er tað sera væl umtókt, at húsaeigarnir prýða síni hús við einari røð av litríkum ljósum. Talan kann bæði verða um einføld ljós, og heilt yvir í tað reyputa við lýsandi trøum, reinsdjórum og átrúnaðarligum motivum. Tey fjálgu og heitu jólakvøldini gera tað møguligt hjá avstralskum familjum at ganga runt í sínum heimbýum og grannaløgum, og síggja hvussu onnur hús í heimstaðnum hava prýtt um við jólaljósum. Ein jólasiður byrjaði í Melbourne í 1938, og hevur síðani spjatt seg um allan heimin. Nevnliga "Carols by Candlelight", har fólk savnast uttandura fyri at syngja jólasangir. Hetta verður gjørt Jólaaftan, ella eitt av kvøldunum beint áðrenn Jólaaftan.





















